Óvanlig mannagongd við ST-brævinum

Hevur landsstýrið sett seg í samband við aðrar altjóða felagsskapir hesum máli viðvíkjandi? spyrja Jóannes Eidesgaard og Edmund Joensen nú brævið til ST gjørdist alment

Ólavur í Beiti

Teir báðir andstøðuleiðararnir, Jóannes Eidesgaard og Edmund Joensen, hava sett løgmanni 7 spurningar í fyrispurningi og vilja teir m.a. hava at vita, hvør í landsstýrinum tikið hevur stig til at senda ST bræv viðvíkjandi samráðingunum millum Føroyar og Danmark? Nær er løgmaður kunnaður um brævið? Hví er brævið ikki undirskrivað av løgmanni, tá politiski boðskapurin í brævinum er, at danska stjórnin ikki veruliga vil samráðast um ein fullveldissáttmála? Og teir spyrja eisini, hví brævið verður sent, tá løgmaður í Útvarpinum 23. august 2000 viðgongur, at ætlanin sjálvandi ikki er, at ST skal leggja upp í samráðingar, og at hetta heldur ikki letur seg gera, um ikki eisini danska stjórnin ynskir tað?

Politisk viðmerking

Í viðmerkingunum til fyrispurningin, siga Jóannes Eidesgaard og Edmund Joensen, at sambært heimasíðu landsstýrisins umsitur løgmaður stýrisskipanina, uttanlandsmál og kommunumál, so tá hetta mál uttan nakran sum helst iva snýr seg um uttanlandsmál, verður fyrispurningurin løgmanni sum ábyrgdahavandi av økinum.

Síðan greiða andstøðuleiðararnir frá gongdini í málinum viðvíkjandi brævinum til ST og eru stórliga bilsnir um at løgmaður ikki hevur kunnað um brævið.

– Í brævinum verður m.a. sagt, at danska stjórnin ikki hevur víst veruligan vilja til at samráðast. Hetta má kallast at vera ein verulig politisk viðmerking, men tó hevur løgmaður ikki undirskrivað brævið.

– Vanliga mannagongdin í sambandi við uttanlandsmál, sum jú er felagsmál, er ikki heldur fylgd, sum eisini brævið frá uttanríkismálaráðharranum til løgmans tann 23. august ber boð um.

– Tað hevur sjálvsagt áhuga fyri bæði spyrjararnar og fyri alt Føroya fólk at fáa at vita, um landsstýrið hevur sett seg í samband við aðrar altjóðar stovnar í sambandi við fullveldissamráðingarnar, siga Edmund Joensen og Jóannes Eidesgaard m.a. í viðmerkingunum.

Fara heldur til Danmarkar

Um somu tíð, sum stórar ætlanir eru fyri framman á útbúgvingarøkinum, er líkt til, at spurningurin um bústaðarmøguleikar verður gloymdur, sigur Katrin Dahl Jakobsen

Ólavur í Beiti

Bústaðartørvurin hevur verið lýstur í Sosialinum herfyri, og nú hevur Katrin Dahl Jakobsen sett mentamálaráðharranum Tórbjørn Jacobsen fyrispurning um bústaðartrupulleikarnar hjá lesandi.

Katrin Dahl Jakobsen, hevur spurt um landsstýrismaðurin veit at siga, hvussu stórur bústaðartørvurin er hjá okkara lesandi? Og hon vil eisini hava at vita, hvønn vanda landsstýrismaðurin sær í, at skúlaungdómur verður tvungin út á privata leigumarknaðin? Og at enda vil Katrin Dahl Jakobsen hava at vita um nøkur ætlan er at bøta um bústaðarviðurskiftini?

Lættari

Í viðmerkingunum sigur javnaðartingmaðurin, at um somu tíð, sum stórar ætlanir eru fyri framman á útbúgvingarøkinum, er líkt til, at spurningurin um bústaðarmøguleikar verður gloymdur.

– At neyðin hjá teimum ungu nú er vorðin so stór, at nógv teirra eru givin at søkja sær innivist, ber boð um, hvussu vánaligar umstøðurnar veruliga eru.

– Somuleiðis, at tað eru tey, sum heldur fara til Danmarkar undir miðnámsútbúgving, tí at tað er lættari at fáa innivist har.

– Skal okkara ungdómur fáa sum mest burtur úr skúlagongdini, ber ikki til at bjóða teimum umstøður, sum gera tað so óliviligt, at arbeiði kemur fram um lesnaðin, sigur Katrin Dahl Jakobsen í viðmerkingunum til spurningarnar.

Bjarni Djurholm sat í gjár, sum landsstýrismaður í Vinnumálum, á fyrsta sinni á landsstýrisfundi

Mynd: Jens K. Vang

Bjarni er nú landsstýrismaður

Á midnátt 28. august tók Bjarni Djurholm við sessinum sum landsstýrismaður í Vinnumálum. Í gjár var hann fyri fyrstu ferð á landsstýrisfundi

John Johannessen

Dagurin í gjár var fyrsti dagurin hjá fólkaflokksmanninum Bjarna Djurholm, sum landsstýrismaður.

Bjarni Djurholm tók við landsstýrissessinum eftir at Finnbogi Arge valdi at fara úr landsstýrinum, so hann aftur kundi røkja starvið sum stjóri á Bilasølu síni, P/F Meinhard Arge.

Bjarni Djurholm fekk longu setanarbrævið 18. august, tá tað var greitt, at hann skuldi taka við landsstýrissessinum, eftir at Finnbogi Arge fyri ólavsøku hevði heitt á løgmann um at verða loystur úr sessinum.

Tískil var eingin formlig tilnevning á skránni í gjár, tá Bjarni Djurholm tók við landsstýrissessinum. Í staðin var almenn móttøka í Tinganesi seinnapartin.

Bjarni Djurholm heldur tað ikki vera so torført at taka við eftir Finnboga Arge, tí nógv mál eru loyst seinastu árini, og hann heldur seg hava eitt gott støði at standa á.

Grundlógararbeiðið út til alment kjak

Arbeiðið í grundlógarnevndini er nú komið mikið langt, at nevndin nú fer at halda regluligar tíðindafundir fyri at skapa alment kjak um ymsu evnisøkini

John Johannessen

Frá í dag fer grundlógarnevndin hvønn týsdag at kunna miðlarnar um eitt ávíst øki í arbeiðinum hjá nevndini.

Enamálið við hesum er at geva almenninginum og viðkomandi feløgum og áhugabólkum høvi at siga sína hugsan og gera sína ávirkan galdandi

Nevndin sigur í tíðindaskrivi, at hon enn ikki hevur tikið støðu til ymsu spurningarnar enn, men hevur lagt dent á at viðgera allar tættir, og síðani taka støðu eftir eitt breitt, almert orðaskifti.

Tí er tað, sum kemur fram á tíðindafundunum, ætlað at skapa kjak, heldur enn at endurgeva nakra avgjørda støðu hjá nevndini.

Higartil hava framløgur verið í grundlógarnevndini um fleiri av evnisøkjunum.

Skipaðir fundir

Tíðindafundirnir verða væl skipaðir í trimum tættum. Á hvørjum fundi verður lagt fyri við einum fakligum inngangi, har skrivarin í nevndini og ein samfelagsfrøðingur leggja fyri við í stuttum at kunna um evnisøkið og støðu tess í grundlógini.

Síðani leggur samfelagsfrøðingurin fram dømi um ásetingarnar. Hann greiðir frá vanligu ásetingunum í s t ý r i s s k i p a n a r l ó g i n i, donsku grundlógini og øðrum grundlógum. Í hesum sambandi fer samfelagsfrøðingurin eisini at vísa á, hvussu orðingarnar innan hansara evnisøki kundu sæð út í einari føroyskari grundlóg.

Samfelagsfrøðingurin og skrivarin fara eisini at greiða frá dømum um, hvønn ítøkiligan týding tað fær, hvussu lógargreinin er orðað.

Allir tíðindafundirnir fara at byggja á teir bólkafundir, framløgur og kjak, ið hava verið í nevndini.

Café Nátúr og Club 20 nú somu eigarar

Fyrsta broytingin var, at starvsfólkið beinanvegin fekk lønarhækkan. – Vit fara at gera alt fyri at bøta umdømið hjá Café Nátúr, siga nýggju eigararnir, Petur Olsen og Toni Dam

Eirikur Lindenskov

Fyri nøkrum vikum síðani boðaði Turið Samró, stjóri í Café Nátúr frá, at tey høvdu selt felagið, ið rekur mat- og ølstovuna, Café Nátúr á Áarvegnum í Havn. Seinnapartin fríggjadagin skifti café'in eigarar. Tá skrivaðu Petur Olsen og Toni Dam undir keypssáttmálan, og harvið yvirtók Sp/F 31. mars 1999 Cáfe Nátúr.

Talan er um sama felag, sum eigur náttklubban, Club 20, ið varð stovnað sum limafelag í 1989.

Tað eru teir báðir, Petur Olsen og Toni Dam, sum eiga hetta partafelag einsamallir, og er tað eisini hetta felag, sum í løtuni er í samráðingum við Havnar Klubba um at skipa ein annan náttklubba í veitsluhøll Klubbans, ið teir kalla Club 25:35 - ein náttklubba fyri tey, sum eru ov gomul at ganga í Club 20, siga teir.

Starvsfólkið fingið lønarhækkan

– Vit ætla at byrja spakuliga, so tað verða ikki tær stóru kollveltingarnar nú beinanvegin, siga teir báðir við ein munn, tá Sosialurin hitti teir í gjár.

– Men ein broyting hendi beinanvegin. Starvsfólkið fær nú meira í løn - tað sama, sum starvsfólkið í Club 20 fær, og tað liggur oman fyri sáttmálan, sum gjørdur er við Gistingarhús- og Matstovufelagið.

Nýggju eigararnir á Café Nátúr ætla at brúka tað næsta hálva árið at finna seg til rættis. Broytingarnar, sum gjørdar verða beinanvegin, verða slíkar, sum kundin ikki fer at merkja.

– Vit skerja beinanvegin niður upp á fyrisitingarútreiðslurnar, sigur Toni Dam.

– Vit hava eina fyrisiting í felagnum, sum rekur Club 20, og henda fyrisiting fer so eisini at standa fyri rakstrinum av Café Nátúr. Á henda hátt vænta vit at spara fitt av rakstrarútreiðslunum, sigur hann.

Fara eisini at selja Restorffsøl

Tað er Føroya Bjór, sum eigur gomlu handilshúsini hjá Essaba, sum hýsa Café Nátúr. Men Føroya Bjór hevur einki við nýggja felagið at gera, siga teir.

Toni Dam og Petur Olsen – nýggju eigararnir av Cafe Natúr

Mynd: Jens K. Vang

Café Nátúr hevur bert selt øl frá Føroya Bjór. Nýggju eigararnir hava gjørt ein nýggjan, langan leigusáttmála við Føroya Bjór - sum ikki hevur nakrar bindingar um, at teir bara skulu selja øl frá Føroya Bjór.

– Men vit fara kortini bara at selja føroyskt øl, sigur Petur Olsen, sum vísir á, at teir á henda hátt vilja stuðla føroysku ølframleiðsluni, sum annars ikki hevur møguleikar at kappast við sterku útlendsku feløgini. Tískil fer at bera til eisini at keypa Restroffsøl á Café Nátúr.

Toni Dam vísir á, at føroysku bryggjaríini hava nógv betri tænastu, enn Rúsdrekkasølan kann veita viðvíkjandi keypi av øli.

– Vit hava fingið sera góða tænastu frá báðum bryggjaríunum í Club 20. Skulu vit selja útlendskt øl, noyðast vit sjálvir í Rúsuna eftir tí, sigur hann.

Duldur keypsprísur

Nýggju eigararnir hava bundið seg til ikki at siga, hvussu nógv teir hava goldið fyri Café Nátúr. Men teir hava keypt smápartafelagið, ið átti caféina. Greitt er tó, at felagið hevði hall upp á umleið eina millión krónur, og tí er neyðugt at broyta raksturin munandi.

– Men vit eru sannførdir um, at vit klára at venda gongdini. Annars høvdu vit ikki fara undir hetta, siga teir.

Teir viðganga báðir, at Café Nátúr er komið í ringt orð av stríðnum um lønariviðurskiftini. Hetta vóna teir at fáa broytt, og vilja teir gera alt fyri, at øll skulu kenna seg væl á Café Nátúr.

Café Nátúr er kend fyri livandi tónleikin, sum ofta er at hoyra. Tað hevur serliga verið jazztónleikarar, ið hava framført har, men hetta verður broytt, siga nýggju eigararnir.

– Vit fara at hava eitt heldur breiðari úrval av tónleiki. Men tað verður ikki bara slíkur tónleikur, sum er at hoyra í Club 20, siga teir - og leggja stóran dent á, at Club 20 ikki á nakran hátt verður flutt oman í Café Nátúr.

Nýggju eigararnir hava stórar vónir til framtíðina.

– Býurin er í støðugum vøkstri, og fer ein oljuvinna at taka seg upp, fer eisini at dryppa á okkara vinnu, siga teir.

Club 20: Frá limafelag til partafelag

Eirikur Lindenskov

Fyri hálvum øðrum ári síðani tóku Toni Dam og Petur Olsen yvir Club 20. Felagið varð stovnað sum limafelag í 1989 og rikið sum aðrir ølklubbar. Men raksturin av felagum gav stórt hall. Tí varð á aðalfundi 31. mars í fjør gjørt av at selja Club 20 til smápartafelagið »31. mars 1999«, sum Toni Dam og Petur Olsen eiga.

Tað er hetta felagið, sum nú hevur keypt Café Nátur.

Síðani tá hava teir báðir greitt størsta partin av skuldini og eru í løtuni í ferð við at nútímansgera hølini hjá Club 20 í Havnar Klubba.

Felagið er eisini í løtuni í samráðingum við Havnar Klubba um leigu av veitsluhøllini til nýggja náttklubban, Club 25:35.

Shetland Cruise 2000 summarið www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag
Gisting á hotelli
(í lágarstíð) er einans ... 864,- fyri hvønn
Gisting á vallaraheimi
(í lágarstíð) er einans ... 691,- fyri hvønn
Privat gisting
(í lágarstíð) er einans ... 819,- fyri hvønn
Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30
Á farstøðini í Lerwick er moguleiki fyri at lata inn viðfari til varðveitslu til fráferðina hjá Norrønu
Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.
Ring og hoyr nærri !
e-mail: booking@smyril-line.fo